# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019/20



## HVAT ER Í MAGUNUM Í SÍLUNUM Á SANDSVATNI




Granskarar: Sandra, Rúna, Sesilia, Vár, Andrea, Martin, Ata, Jákup Andrias, Brandur, Sámuel, Demmus Rói, Sarita, Karin, Kjartan, Elsi, Sigurður, Sissal.

# INNGANGUR

Vit eru 6.fl í Sandoyar Meginskúla og vit granska, hvat er í magunum í sílunum á Sandsvatni. Vit byrjaðu við at skriva fleiri spurningar upp á talvuna, so atkvøddu vit um, hvat var tann besti spurdómurin. Vit endaðu við hesum spurninginum “hvat er í magunum á sílunum á Sandsvatni” og “hvussu skitið er Sandsvatn” síðani blivu vit deild upp í fleiri bólkar. Og næsta dagin blivu vit øll biðin um at taka fiskireiðskapir við, tann dagin fingu vit onki, men næsta dagin prøvaðu vit aftur, og tá fingu vit eitt síl.


Lærari: Jógvan Vest

Navn, teldupostur

Luttakarar: Sandra, Sesilia, Ata, Sissal, Andrea, Vár, Karin, Elsi, Rúna, Sarita, Kjartan, Martin, Jákup Andrias, Demmus Rói, Sigurður, Sámuel.



Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

Hvat er í magunum í sílunum á Sandsvatni?

2. Hví er tað so?

Vit eru áhugað í at vita, hvat av djóraæti er í Sandsvatni. Hetta síggja vit við at kanna magar í sílum. Eisini vilja vit vita, hvat sílini eta.

3. Legg eina ætlan

Fyrst fara vit at kanna, hvussu vit skulu fiska sílini.

Síðani fara vit at fáa fiskireiðskap til vega.

Vit fara at fáa jollur, sum vit kunnu brúka at fiska við.

Vit gera eina línu sum vit set á sandsvatni.

Vit fara at fiska við tráðu og línu.

Vit hyggja í magarnar í sílunum.

Vit fara at kanna hvat er í maganum.

4. Savna upplýsingar

Vit byrjaðu við at gera eitt lutakast um hvørjir spurningar vit skuldu granska í, vit endaðu við spurningunum, "hvat er í magunum í sílunum á sandsvatni" og "hvussu skitið er Sandsvatn".

Dagin eftir hetta blivu vit biðin um at taka fiskireiðskapir við í skúlan, sum til dømis tráðu, flot og spinnarar, spannir og bjargingarvestar. Sama dag fór ein bólkur eftir eini jollu, ið vit høvdu lánt, og sigldu inn í Dal. Tey fiskaðu eisini við jolluni, men fingu onki. Aftaná hettar fór ein annar bólkur við einari aðrari jollu, men fingu heldur onki.

Næsta dag fóru nøkur børn við einum lærara út á vatnið at seta línu. Ímeðan fóru hini í flokkinum út at royna seg. Tey stóðu øll í ein góðan tíma, til ein drongur at enda fekk eitt síl.

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Møgulig undirpunkt

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hvat er i magunum í sílunum á Sandsvatni

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Tí vit vilja vita hvat ið tey liva av. Vit hava hugsað um, at tey møguliga liva av vatnloppum, flugum, mýggjabitum og øðrum.

Tað sum vit finna í magunum, er jú tað, ið sílini hava etið.

Tá vit hava fiskað sílini, kruvt tey og kannað magan, kunnu vit vísa á, hvat tey hava etið.

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Fyrst fara vit at kanna, hvussu vit skulu fiska sílini.

Vit tosaðu um hvat vit skuldu hava við í skúla, vit endaðu við at taka tráður og línu við. So fóru nøkur eftir tveimum jollum, sum vit hava lánt, tí at vit skuldu brúka tær at seta línu við.

Síðani fara vit at fáa fiskireiðskap til vega.

Ein lærari saman við trimum næmingum fóru at skaffa línu, nylon teymar, húkar og keyptu rækjur til agn.

Vit gera eina línu sum vit seta á Sandsvatni.



Vit brúktu eitt pappstykki at seta

húkarnar fastar á, so tað ikki skuldi

fløkjast.



Her ger hann flot, søkk og standarar.



Nú er línan klár at egna og seta.

Vit fara at fáa jollur, sum vit kunnu brúka at fiska við.

Síðani fóru vit at fiska. Vit fiskaðu leingi fyrsta dagin men fingu onki. Næsta dagin fingu vit eitt síl, bløðgaðu tað og kravdu tað dagin eftir.


Vit gera eina línu sum vit seta á Sandsvatni.




Vit gera eina línu sum vit seta á Sandsvatni.



Vit fara at fiska við tráðu og línu.



Vit hyggja í magarnar í sílunum.



Vit fara at kanna hvat er í maganum.

# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

**9. juni** fangaðu vit eitt síl sum vigaði 437g og var 35cm langt. Í sílinum funnu vit rogn, mýggjabita, men annars var magin tómur. Bleiv  kruvdur 11.juni. Møguliga funnið okkurt, um hann bleiv kruvdur sama dag hann bleiv fiskaður.



Møguliga eru vatnloppur.

**11. juni** fangaðu vit eitt síl sum vigaði 350g og var 34cm langt. Í sílunum funnu vit mýggjabita, og vit funnu onki rogn



**12. juni** fangaðu vit eitt síl sum vigaði 379g og var 36,5cm langt. Í sílunum funnu vit mýggjabita, ormar og vit funnu onki rogn



**16. juni** fangaðu vit eitt síl sum vigaði 316g og var 33,2cm langt. Í sílunum funnu vit mýggjabitar



# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til at sílini í Sandsvatni eta mýggjabitar, smáar verður og maðkar sum vit ikki sóu í mikroskopinum.

Mikroskopið er ikki nóg sterkt, so vit kunnu ikki síggja hvørjar smáar verður sílini eta.

Vit eru eisini komin fram til, at tað ikki riggaði væl hjá okkum at fiska við tráðum á Sandsvatni, og at vit ikki fingu so nógvir fiskar, sum vit høvdu væntað. Orsøkirnar til hetta kunnu vera, at tað var fitt av vindi teir dagarnar vit fiskaðu og sólin skein. Hetta kann hava ávirkað sílini, so tey ikki tóku.

Vit høvdu ikki trúð at vit fingu líka nógvar álar sum síl.

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit ætla okkum at gera eina plakat av kanningarúrslitinum, sum vit síðani fara at heingja runt á skúlum og øðrum almennum støðum á Sandoynni. Plakatin skal minna um tær vísindaligu plakatirnar, ið vit vanliga síggja í gransking. So kunnu fólk, sum vitja oynna og búgva her, síggja, hvat livir í Sandsvatni.

# FYLGISKJØL

1.

2.

3.

4.